## Oljukortið yvir Atlantsmótið

Í sambandi við oljuráðstevnuna, sum varð hildin í Norðurlandahúsinum mikudagin, hevur Sosialurin í samstarvi við Statoil gjørt eitt nýtt aktuelt kort yvir Atlantsmótið tvs. økið eystan fyri Føroyar og vestan fyri Hetland við tilknýti til tað leitivirksemi, sum hevur verið og verður. Vanliga vísa slík oljukort bara tann eina partin av Atlantsmótinum. Her er so gjørd ein roynd at vísa alt økið millum Føroyar og Hetland sum eina heild. Á kortinum síggja vit tey feltini, sum framleiða olju og tey, sum verða bygd út til framleiðslu. Har er yvirlit yvir brunnarnar, sum eru boraðir í økinum, og har verður víst á, hvørjir brunnar verða boraðir næstu árini, umframt at tað greitt framgongur, hvørji feløg standa fyri ymisku loyvunum, báðumegin miðlinjumarkið. Tað hevur víst seg at vera stórur áhugi fyri kortinum og í hesum sambandi bjóðar Sosialurin lesarunum eitt printað kort í góðum pappíri fyri 150 kr. Ringið til blaðið á telefon 311820, spyrjið eftir Duritu og bíleggið kortið ella tit senda okkum ein teldupost,
durita@sosialurin.fo






# Vunnu 15.000 kr.

**Tað gjørdist liðið Alle alle av Tekniska skúla í Klaksvík, ið vann Xplore kappingina. Vinningurin er 15.000 kr.**

XPLORE
*Heri á Rógvi*



*F.v. Ólavur Ellefsen, fyriskipari av kappingini, Hallur Joensen, Rói Jacobsen og Gunnleivur Biskopstø á oluráðstevnuni, har teir tríggir fingu handaða virðislønina fyri sigurin í kappingini.*

*Mynd: Jan Müller*

Liðið Alle alle (fulkubbi) av Tekniska skúla í Klaksvík gjørdist endaligi vinnarin av Xplore kappingini. Manningin á liðnum varð hendan: Hallur Joensen, Rói Jacobsen og Gunnleivur Biskopstø.

Fríggjadagin fingur teir handaða virðislønina fyri sigurin. Virðislønin vóru 15.000 kr. at býta millum sín fyri avrikið. Tað var Eyðun Elttør, landsstýrismaður í oljumálum, sum handaði teimum trimum vinningin.

Vinnandi liðið av Tekniska skúla í Klaksvík vóru eisini fremstir í innleiðandi umfarinum, og harvið favorittar til at vinna finaluna.

Vinnarin av spælinum er tað liðið, ið fær flest inntøkur fyri hvørja útreiðslukrónu. Liðini skulu nýta pengar til kanningar, boringar og annað – eins og í veruleikanum.

Í finaluni var eisini ein dómsnevnd sett við tveimum fólkum frá Agip og einum umboði úr Oljumálaráðnum.

Dómsnevndin hugdi í finaluni eftir, hvussu liðini kláraðu seg á øllum øllum økjum.

Semja var um, at vinnandi liðið skuldi vera teir tríggir av Tekniska skúla í Klaksvík. Øll liðini í kappingini eru kallaði eftir ymiskum fuglanøvnum, og vinnandi liðið Alle alle er látínska heitið fyri fulkubba.

Liðini á øðrum og triðja plássi vóru úr Studentaskúlanum av Kambsdali. Úr hinum bygninginum av Kambsdali kom liðið á fjórða plássi. Tekniski skúli í Klaksvík átti eisini liðið á fimmta plássi.

### 65 lið

Frá byrjan vóru 65 lið við kappingini. Lið úr flest øllum miðnámsskúlum í Føroyum vóru við. Nøkur fá eru follin frá, men sum heild hevur áhugin fyri spælinum verður stórur, og fyrireikararnir lata eisini væl at.

– Vit mugu siga, at kappingin gjørdist sera væl eydnað, sigur Ólavur Ellefsen, stjóri fyri Tøkni, ið hevur staðið fyri verkætlanini.

Kappingin er grundað á spælið Xplore, ið snýr seg um oljuleiting.

Í innleiðandi umførinum kappaðust liðini í tveimum bólkum, og fimm tey bestu liðini komu í finaluna. Hóast finalan varð hildin fríggjadagin varð finnaran ikki kungjørdur fyrr á oljuráðstevnuni mikudagin. Liðini vóru sum oftast mannaði við trimum luttakarum ella fýra, og flest øll fingu skúlatímar settar av til at kappingina og spælið. Hjá fleiri rakk áhugin eisini útum skúlatíðina.

Ólavur Ellefsen sigur, at teir eru bilsnir av áhuganum og evnunum hjá føroysku næmingunum.

Spælið er grundað á prinsippið »Learning by doing«, og eingin hevur sannað hetta meira enn vinnararnir av kappingini.

– Hetta er ein fínur háttur at læra okkum ungdómar, tí um vit skuldu lisið okkum til alt hetta, sum vit nú hava lært, so hevði so gott sum onki sitið eftir í høvdinum. Tí ein lærir best við at sleppa at royna seg sjálvur, søgdu teir tríggir, tá Sosialurin tosaði við teir herfyri.

### Gjørt í Føroyum

Xplore er gjørt og útviklað í Føroyum og er partur av førleikamenningini, ið oljufeløgini hava bundið seg til at nýta pengar til í Føroyum.

Sansir hevur forritað spælið og gjørt tað grafiska arbeiðið. Tøkni hevur staðið fyri verkætlanini í samstarvi við Agip og Føroya Kolvetni, sum er eitt av útlendsku oljufeløgunum í føroyskum øki.

Til at menna spælið hava ymsir útlendskir ráðgevarar eisini verið við í framleiðsluni.

Sosialurin ynskir teimum trimum hjartaliga til lukku við sigrinum.

# Nýggjar sendingar

**Hjá SvF hyggja tey upp á, hvørjar nýggjar sendingar, gerast skulu við meirinntøkuni frá økta sjónvarpsgjaldinum**

SJÓNVARP
*Heri á Rógvi*




*Sjónvarp Føroya hevur ætlanir um trý sløg av nýggjum føstum sendingum*

Í gjár skrivaðu vit um, at SvF við teirri væntaðu meirinntøkuni fyri hækkaða sjónvarpsgjaldið fer at gera meira føroyskt tilfar.

Tað verður ikki øll verðin av nýggjum tilfari, hyggjararnir kunnu vænta sær.

Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóri, greiddi í gjár frá, at rakstraríløgur og lønarhækkingar væntandi fara at stjala tað mesta av inntøkuvøkstrinum. Tað, sum er eftir, fer so til at gera nýtt tilfar fyri.

– Vit kanna í løtuni tríggjar møguleikar: Ein fimmta tíðindasending um vikuna, ein fasta ítróttarsending og eina ungdómssending, sigur Mikkjal Helmsdal.

Sendingarnar eru ikki raðfestar í nakrari raðfylgjuni. Sjónvarpsstjórin upplýsir, at teir í løtuni kanna, hvørjar møguleikar, Sjónvarpið hevur.

– Vit hava í longri tíð onga ungdómssending havt. Somuleiðis hava vit onga fasta ítróttarsending havt. Hetta eru sendingar, ið kosta nógv at framleiða, men nú hava vit víðkaðar fíggjarligar rammur, sigur Mikkjal Helmsdal.

Ætlanin er at hækka sjónvarpsgjaldið við 400 kr. umframt Mvg til 2.000 kr. fyri hvørt húski við sjónvarpstóli.

Í Sjónvarp Føroya meta tey, at hetta vil geva stovninum einar 4,5-5 milliónir meira í inntøku.

## Sølan byrjar fríggjamorgunin

Fríggjarmorgunin byrjar sølan av móttakarum ella set-top boksum til at taka ímóti og síggja Televarpið.

Televarpið tendraði fyri sínum sendara í gjárkvøldið, t.e. hóskvøldið áðrenn blaðið fór til prentingar, og fríggjamorgunin kunnu móttakararnir keypast fyri ein vegleiðandi prís, sum er settur til 2.195 kr.

Í fyrstu atløgu verður Televarpið at síggja í Havn, men fyrst í komandi ári verður farið undir at fyrireika at senda í Eysturoynni, í Klaksvík og aðrastaðni við.



*Hesir verða væntandi ein væl umtókt søluvøra í Havn í jólamánaðinum*